

## Nýtt innbrot hjá Liverpool stjørnu

Fyri fimtu ferð hevur tað verið innbrot hjá einum Liverpool leikara, hesu ferð var tað hálendski Dirk Kuyt, ið stóð fyri skotum. Dirk Kuyt er í løtuni saman við hálendska landsliðnum, og meðan hann er tað, hevur innbrot verið í bústaði hansara, veit Ekstra Bladet at siga. Við hesum, er hálendski landsliðsleikarin tann fimti í røðini av Liverpool leikarum, ið hava verið burturstaddir og eru komnir heim til eitt hús, ið er rubbað fyri virðislutir. Bæði danski Daniel Agger, umframt Peter Crouch, José Reina og Jerzy Dudek hava hendan ivasama heiður.

# Tað lætta gerst trupult

**Jógvan Martin Olsen ásannar, at fyrireikingarnar hjá føroyska liðnum als ikki hava verið optimalar, nú liðið skal spæla seinasta undankappingardystin í hesi kappingini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*




*Uppgávan hjá føroyska landsliðsvenjaranum er – um gjørligt – enn truplari mikukvøldið, enn bara tað at spæla móti heimsmeistarunum*

**Modena, Italia:** Líka síðani dystarskráin varð løgd, hevur føroyski landsliðsvenjarin vitað, at talan kundi gerast um eyka trupla uppgávu, nú vit skriva november, og landsliðið skal í dyst.

Eitt er, at menn eru væl fyri kropsliga. Men vantandi dystarvenjingin merkir eisini, at tað, sum eigur at fella einum spælara lætt, brádliga ikki er heilt so lætt, kortini, sigur Jógvan Martin Olsen.

- Taka vit dystin hjá U21 móti Albania, so haldi eg, at vit síggja nøkur eyðkenni um, at menn ikki eru í optimalari dystarvenjingin. Serliga timingin og automatiseringin hava lyndi at hvørva. Og tað at gera tað einfalda verður brádliga trupult.

Men júst tað, at spælarar kanska steðga ein brotpart av einum sekundi ov leingi. Tað er væl ikki tað, sum tú hevur mest brúk fyri, tá spælt verður móti Italia?

- Nei, avgjørt ikki. Og tað ger væl, at útgangsstøðið verðu rættiliga verjukent hjá okkum. Nú vita vit ikki, hvussu teir spæla, tí tað er væl hugsandi, at fleiri av eykaspælarunum fáa møguleikan, nú teir hava spælt seg víðari. Sjálvur hevði hildið, at tað vildi verið best fyri okkum, um allar tær stóru stjørnurnar vóru á vøllinum. Nú kann væl hugsast, at teir, sum byrja á vøllinum, veruliga vilja vísa, at teir eiga at teljast millum teir fyrstu ellivu.

- Alt hetta ger, at fyrireikingarnar hjá okkum verða enn truplari, tí tað er ikki vist, at tað nyttar okkum nakað at hyggja at upptøkum hjá liðnum, um tað nú eru 11 aðrir mans, sum koma á vøllin mikukvøldið. Men tá tað er sagt, so er tað framvegis Italia, sum vit spæla ímóti. Og vit vita so undir øllum umstøðum, at talan er um eitt lið í heimsflokki, sigur Jógvan Martin.

# Alt snýr seg um vertirnar

**Tað er ikki føroyska landsliðið, sum hevur størsta áhugan, nú Italia skal enda undankappingina á heimavølli móti pinkutjóð**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk/*
*jakup@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

**Modena, Italia:** Ein myndamaður, tvey lítil sjónvarpslið og einstakir skrivandi blaðmenn. Tað var liðið av fjølmiðlum, sum stóðu fyri føroyska fótbóltslandsliðnum, tá liðið í gjár fór undir venjingarnar á seinastu landsliðsferðini í ár.

Tað merkir tó ikki, at áhugin fyri dystinum er lítil. Men heldur, at tað ikki er mótstøðan hjá Italia, sum er so øgiliga áhugaverd. Fótbóltur liggur í blóðinum hjá italiumonnum, og í fleiri bløðum verður gjørt heilt nógv burturúr, nú tað er vist, at Italia eisini er umboðað í komandi EM-endaspælinum.

Italska landsliðið hevur venjingarlegu nakað norðanfyri Modena, og tað er fyrst og fremst her, at fjølmiðlarnir halda til. Seinnapartin í dag kemur hópurin so til býin, har dysturin skal spælast, og tá er einki at ivast í, at fjølmiðlaliðið verður nakað størri í vavi. Vanliga eru oman fyri 100 fjølmiðlafólk við, tá italska liðið ferðast, og so kann jú verða, at onkur teirra eisini hevur stundir at gáa eftir mótstøðuni. Eisini hóast Jacobsen, Mikkelsen og Benjaminsen ikki ljóðar heilt so eksotiskt sum Toni, Buffon og Cannavaro.



*Tað er fyrst og fremst italska liðið, sum hevur áhuga hjá lokalu miðlunum. Bert nøkur fá tandur høvdu givið sær far um, at føroyska liðið eisini roynir at fyrireika seg til uppgávuna*